# TILNEVNINGARNAR 2009

## BESTI BÓLKUR ELLA EINSTAKLINGUR

### Høgni Lisberg



**Nógv vatn er runnið í ánna, síðan tann blaðungi Høgni Lisberg sat aftanfyri trummurnar í bólkinum Clickhaze. Saman við Clickhaze vann hann Prix Føroyar og spældi á Roskilde Festival, men tað var ikki fyrr enn Høgni fór sololeiðina, at hann veruliga spílaði seg út.**

Høgni Lisberg hevur gávur sum fáur. Hann hevur ferð eftir ferð prógvað, at hann er meira enn ein habilur lagsmiðjur og sangari. Við nýggju fløguni "Hare! Hare!" hevur hann borðreitt við einum skitnum neo-hippie/soul rokki, sum ikki er hoyrdur fyrr. Bólkurin svingar púra svakt, og við ræddar framførsluni hjá Høgna gongur alt upp í eina hægri eind. Tað serliga við tónleikinum á Hare! Hare! er, at hon er so beint í gronina skitin, rótut og lekkur. Tónleikuri er innballaður í eina sera rútmiska embalasju. Júst tað rútmiska er tað, sum ger útgávuna so feita.

### Orka

**2009 varð árið, har Orka staðfesti seg sum tann stóra vónin í føroyskum tónleiki. Millum hæddarpunktini kunnu nevnast framførslur á SPOT festivalinum og á fronskum festivali. Ikki færri enn tveir dokumentar filmar eru gjørdur við føroyska bólkinum í 2009.**



Orka hevur nakað, sum ongin annar bólkur hevur. Umframt ta uppløgdu orku, sum navni sipar til, so hevur bólkurin tað sereyðkenni, at bólkurin einans nýtir heimagjørd ljóðføri. Stutt sagt, Orka er eitt hugskot sum riggar.

Bólkurin er mannaður við sera kompetentum tónleikarum. Nevnast kunnu Jens L. Lisberg, Kári Sverrisson, Bogi L. Thomsen o.a. Hesir eru alt tónleikarar, ið vit vanliga seta í samband við Grót umhvørvi, og eru hesir eisini tónleikarar, sum hava verið partur av nøkrum av teimum bestu bólkunum í nýggjari tíð. Tónleikurin hjá Orka er eitt slag av eksperimenterandi rokki. Kompositiónirnar eru ikki so torskildar, men saman við alternativu instrumenteringini, gerst tónleikurin hjá Orka ein verulig perla. Vit, sum upplivdu Orka á G! Festivalinum í summar, og á stóra Føroyar Móti Krabba tiltakinum, kunnu bara staðfesta, at bólkurin er í serstakliga góðari venjing.

Orka byrjaði sum ein verkætlan í einum fjósi á Eysturoynni eitt gamlaárskvøld í 2005. Síðan hevur tað bara vundið uppá seg. Bólkurin gjørdist beinanvegin væl dámdur her í Føroyum, og so við og við er bólkurin við at vinna sær hevd úti í heimi. Í heyst var bólkurin á drúgvari ferð í Evropa, og í 2010 verður farið í upptøku hølini at framleiða uppfylgjaran til "Livandi Oyða".

### Páll Finnur Páll




**Einasti bólkur sum kann geva Frændum skarpan gang. Við trimum studioútgávum hava Páll Finnur Páll longu eitt imponerandi savn av sangum í skjáttuni.**

Tað, sum ger Páll Finnur Páll so serligar er, at teir hava ein sermerktan eginleika at skriva fólksligar, flatar, fúlar ballingarsangir – sum fólk elska.

At uppliva Páll Finnur Páll á einum palli, við einum stúv stappaðum dansigólvi av glaðum áhoyrarum, er ein dýrabar løta. Líka mikið hvat teir tríva í, so livir fjøldin við teimum. Við teimum karismatisku oddamonnunum Finnur og Páll Oddur, hava teir eitt toymi av musikalskum gyklarum, sum eru eminentir til at fáa øði í grindina.

Í vetur lótu teir ein tónleikapakka frá hondum – "Du ved, at gjørt er gjørt". Ein uppsamling við teimum trimum studiofløgum hjá bólkinum, umframt ein live-útgáva av framførsluni hjá bólkinum á Ólavsøkukonsertini 2009.

### SIC

**Føroya harðasti bólkur hevur í 2009 verið á drúgvari konsertferð kring Evropa. Í tíðarskeiðinum apríl til mai spældi bólkurin heilar 47 konsertir kring Evropa.**



Bólkurin brynjaði seg til konsertferðina við at fara á eina intensiva venjingarlegu, har vant varð frá morgni til myrkurs allan mars mánað. Sostatt kann sigast, at bólkurin veruliga er farin at taka tónleikin í álvara, og veruliga er farin undir at professionalisera metal tónleikin.

Eftir konsertferðina kom bólkurin sum hamskiftur aftur til Føroya í summar, og spældi nakrar av sínum bestu konsertum nakrantíð á G! Festivalinum og á Ólavsøkukonsertini.

Við fløguni "Pandemonium" á bakið, hevur bólkurin ment seg frá at vera ein undirgrunds metal bólkur til at verða eitt komplett fucking metal show.

Tónleikurin hjá SIC kann best lýsast sum eitt osandi tok, sum fer brakandi eftir landslagnum við tí #"&%%#) ferð, og steðgar ikki fyri nøkrum. Eddie (gittarleikari í bólkinum) segði soleiðis um tónleikin í einari sjónvarpssamrøðu: "Tað er svart og tað er hart". Væl rakt. Við løgum sum "To Dare To Risk To Regret" hómar tú eina melodiøsa síðu av bólkinum, sum ger tónleikin hjá SIC enn meira atkomuligan.

### The Dreams

**Viku eftir viku finna vit teir ovast á donsku hitlistunum. Viku eftir viku verða teir tráspældir í loft- og netmiðlunum. Og nú tykist sum trýfetsrakettin hjá bólkinum er um at náa sítt klimaks. The Dreams eru í ferð við at hertaka heimin.**

Við sjónbandalagnum "Under The Sun" kulmineraði 2009 fyri The Dreams. Árið hevur verið ein sonn sigursgongd hjá The Dreams á danska marknaðinum. Danski ungdómurin hevur tikið serstakliga væl ímóti The Dreams, og møtir trúfastur upp til konsertir og annað. The Dreams hava verið í einari stigvísari menning. Fyrst tóku teir Føroyar. Síðan tóku teir Danmark. Og nú stendur heimurin fyri tørni. Bólkurin undirskrivaði fyrr í ár ein plátusáttmála við eitt franskt plátufelag. Sostatt er nógv sum bendir á, at ferðin móti tindunum hjá The Dreams bert er byrjað.



Tónleikurin hjá The Dreams kann lýsast sum popp/punk tónleikur, sum er rættiliga væl dámdur í hesum døgum. Saman við bólkum sum Tokyo Hotel hava The Dreams tikið stafettina víðari frá Greenday, og víðari menna teir hetta slagið av tónleiki. Eisini í Føroyum eru aðrir líknandi bólkar byrjaðir at koma undan kavi. Eitt nú spennandi bólkurin Oniontree.

## BESTA ÚTGÁVA

### By the Light of the Northern Star – TÝR



**Víkingarokkararnir lótu í 2009 úr hondum enn eina framúr fløgu. "By the Light of the Northern Star" staðfestur enn einaferð, hvussu tekniskt væl fyri tónleikararnir í TÝR eru, og hvussu góðir lagsmiðjir teir eru.**

Síðan TÝR í 2000 lat gera eina demo, hevur bólkurin latið úr hondum 8 studioútgávur. Við "By the Light of the Northern Star" heldur sigursgongdin fram. TÝR er óivað ein hin sterkasti bólkurin í heiminum til júst hetta tónleika slag. Um tú lurtar eftir lagnum "Hold The Heathen Hammer High" á fløguni, hoyrir tú júst hvussu væl fyri TÝR eru. Her eru flottar gittar framførslur, imponerandi vokalar framførslur og eitt samanspæl, sum svingar so tað baskar. Tað serliga við TÝR er ikki, at teir íðka eitt so smalt tónleikaslag. Nei, tað serliga er, at teir gera tað 100%. Tá eg upplivi teir á konsertum, plagi eg at smílast eitt sindur at byrja við. Haldi tað vera fjákut, at vaksnir menn spæla slíkan "víkingarokk". Men eftir at hava upplivað nøkur løg, plagi eg at gerast meira og meira sannførdur um, at teir gera tað av fullum hjarta. Júst so, er tað eisini við "By the Light of the Northern Star". Hon veksur so líðandi, og tá ið alt kemur til alt, so er talan um feitan rokktónleik.

### Koder på snor – Valravn

**Við føroysku Onnu Katrin Egilstrøð heldur Valravn áfram við at staðfesta seg á danska tónleikapallinum. "Koder på snor" er seinna útgávan hjá bólkinum. Við hesari útgávuni hevur bólkurin lagt seg eftir at spæla egin løg fyrst og fremst, og staðfestast má, at royndin er heilt væleydnað.**

Ummælarin hjá Gaffa var fyrr í ár so bersøgin, at hann skrivaði "Valravn har begået en af årets bedste plader".